SØVN LANDSINS

BÓKAVØRÐUR

Ein av okkara bókavørðum er farin í farloyvi í 2 ár, og tí søkja vit eftir bókavørði til Landsbókasavnið hetta tíðarskeiðið at byrja 1. oktober 2013 ella skjótast tilber.

Starvið
er parttíðarstarv og arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna. Arbeitt verður í vaktum.

Uppgávurnar
eru fjølbroyttar og arbeiðið fakliga krevjandi og fevnir um m.a.

- skráseting av handrita- og øðrum bókasavnstilfari
- vaktir í útláninum
- annað bókavarðaarbeiði eftir avtalu

Førleikar
Til starvið krevst bókavarðaútbúgving. Dentur verður lagdur á, at bókavørðurin er sinnaður at luttaka í skipan av arbeiðsuppgávum og menningarátøkum, og vit rokna við, at tann, ið settur verður, hevur:

- góð samstarvsevni
- sjálvstøðugt arbeiðslag
- góðan tænastuhugburð
- og góðan telduførleika

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Erhard Jacobsen, leiðara á Landsbókasavninum, tlf. 790 510.

Umsóknir
til starvið skulu saman við avriti av prógvum og yrkisleið (cv) sendast til:

Søvn Landsins
Postrúm 1155
110 Tórshavn, ella til savn@savn.fo
Umsóknarfreistin
er fríggjadagin 20. september 2013.

Landsbókasavnið, sum er ein deild í Søvnum Landsins, er tjóðbókasavn og hevur sum høvuðsuppgávu at savna inn, skráseta, varðveita og fremja útbreiðslu av kunnleika um føroyskar bókmentir og av bókmentum um Føroyar. Harumframt veitir Landsbókasavnið vísindabókasavnstænastu. Landsbókasavnið skipar fyri skráseting av føroysku tjóðbókaskránni og er føroysk ISBN, ISMN og ISSN-skrivstova.

flb.fo



Aut. Rúsdrekka/
rúsevnisviðgeri
Familjuráðgevi

Einstaklingar
Avvarðandi
Uppvøkstur

International Certified
Alcohol & drugs Counselor
Erna S. Hákonardóttir
Viðtala tel. 257538

TILTØK

Gudstænastur sunnudagin 15. september
Leguhúsið Nesvík: kl. 9.45 Hanus á Gørðum "Okkara lega"
Christianskirkjan: kl.11, Lestur Sumba: kl 11, John Myllhamar Havnar kirkja: kl.11, prestvígsla v/ Jógvan Fríðriksson, biskupi. Marjun í Kálvalíð verður prestvígd Hoyvík: kl.11, lestur Vágur: kl. 11, Patrick de Neergaard. Verður útvarpað

Gudstænasta sunnukvøldið 15. sept.
Hátíðarguðstænasta í Kvívíkar kirkju sunnukvøldið kl. 18. Kvívíkar kommuna 100 ár. Altargongd, Tórshavnar manskór syngur. Eftir guðstænastuna verður kirkjukaffi.
Theodor E. D. Olsen, Bergtórur H. Bjarkhamar og Marjun í Kálvalíð.

Fríkirkjan Oasan
Sunnudagin 15. septembur
Kl. 11:00 Guðstænasta v/ Pauli Høj
Kl. 12:00 Sunnudagsskúli
Mánadagin 16. septembur
Kl. 19:00 Bønarmøti
www.oasan.fo

Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík
Fríggjakvøld, 13 september,klokkan 20; Møti v/Mike Riordan
Leygarkvøld.14 september, klokkan20; Møti v/Mike Riordan
Sunnudagin, 15 september, klokkan 11.30; Barnakórið venur, klokkan 12; Møti v/ Mike Riordan, sunnudagsskúli er undir møtinum og barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur.
Verið øll hjartaliga vælkomin
Sí annars skránna á www.Immanuel.fo & á facebook síðu okkara Samkoman Immanuel

Lívdin í skúlanum við Løgmannabreyt
Sunnudagur 15. september: Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 11.00 Hoyvíksmøti kl. 12.00
Á familjumøtinum luttaka Miriam og Niels Vang.
Á Hoyvíksmøtinum talar Jógvan Zachariassen, evnið er: "Galatarbrævið, partur 22"
Barnaansing er undir báðum møtunum.
Sunnudagsskúli kl. 12.00
Hjartaliga vælkomin.
www.livdin.fo

Samkoman Marknagil
Fjalsg.2, Tórshavn.
Sunnudag: Morgunmøti kl 10.30, Sunnudagsskúli kl. 12.
Sunnukvøld
kl. 18 evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønar- og uppbyggingarmøti,
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsiðm við Landavegin
Sunnukvøldið kl. 18.00 møti v/Hera Joensen

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagur 16. september kl. 15.00 í KFUK: Seinnapartsamkoman, Martin Joensen syngur og sigur frá.
Mikudagur 17. september kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur, hetta er fyri ung.
Hósdagur 19. september kl. 15.00: Túrur avlýstur í staðin hugnakvøld.
Mánadagur 23. september kl. 15.00: Seinnapartsamkoman við Derhard Jógvanson
Mánadagur 30. august kl. 15.00 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Heina F. Petersen og Theodor Hansen.

LANDSGRANNSKOÐANIN
THE NATIONAL AUDIT OFFICE OF THE FAROE ISLANDS

LANDSGRANNSKOÐANIN
søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir starvsfólki at byrja skjótast gjørligt. Vit kunnu bjóða eitt áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði, ið fevnir um at grannskoða almennar stovnar, skipanir og virkir, umframt at hava um hendi roknskapar- og skrivstovuhaldið hjá Landsgrannskoðanini.

Førleikakrøv:
Tað er ein treyt at tú hevur skrivstovuútbúgving innan almenna fyrisiting. Útbúgving ella royndir innan almenna ella privata grannskoðan og/ella almenna roknskaparhaldið eru avgjørt eisini fyrimunir.

Vit leggja dent á, at tú hevur góð samstarvsevni, ert arbeiðssamur, nærlagdur, dugir væl at skriva og at samskifta við stovnar og starvsfelagar.

Lønar- og setanarviðurskifti:
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn:
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum o.ø. skal sendast til:

Landsgrannskoðanina
Tráðagøta 43
Postrúm 2053
165 Argir
ella sum teldupostur: postur@lg.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. september 2013. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Dam, á tlf. 355100 ella 226301. Fyrispurningar verða viðgjørdir í trúnaði.

Tú kanst fáa meira at vita um Landsgrannskoðanina á heimasíðu okkara: www.lg.fo.

Goymsluhøli til leigu

120 fermetrar høli til leigu á Hálisi í Havn.
Góð tilkoyring og uml. 200 fermetrar øki uttanfyri.

Tlf. 217300

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

Nes kommuna søkir eftir 2 fólkum til tekniska økið

Søkt verður eftir 2 fólkum at byrja 1. oktober, ella sum skjótast. Talan er um 2 fulltíðarstørv, harav annað er eitt tíðaravmarkað fulltíðarstarv fyri restina av hesum árinum, við møguleika fyri, at tað verður longt.

Førleikar
Tað er ein fyrimunur, at umsøkjararnir hava handverkaraútbúgving og royndir í at koyra minni gravmaskinu, men tað er ikki ein treyt. Teir settu verða partur av toyminum sum umsitur tekniska økið, og arbeiðsuppgávurnar verða m.a.:

- húsavarðauppgávur av kommunalu bygningunum
- vaktarhald á endurnýtsluvirkinum
- vatn- og kloakkleiðingsarbeiði
- veg- og gøtuarbeiði
- kirkjugarðsarbeiði

Løn – og setanartreytir
Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Handverkarafelag ella Føroya Arbeiðarafelag.

Umsóknir
Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til:

NES KOMMUNA
Toftavegur 3
FO-650 Toftir
ella við telduposti til: nes@nes.fo

Umsóknir skulu vera Nes kommunu í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin, 27. september 2013.**

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við Aksel Højgaard, tekn. leiðara, tlf. 565001.